LM-045/2023



Kynslig avnoyðsla og lokking

Broytingar í kapitli 24

Gudrun Mortansdóttir Nolsøe
fulltrúi

LØGMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Justice

Hvat fevnir broytingin um

- Broytingarnar yvirskipað
  - Fyrning § 94, stk. 4
    - Uppskotið leggur upp til, at fyrningarfreistin fyri brot á nýggju ásetingina um lokking móti einum barni undir 15 ár, í fyrsta lagi verður roknað frá tí degi, at tann órættaði fyllir 21 ár. Tað sama er galdandi í mun til blúnisbrot.
  - Kynslig avnoyðsla § 225
    - Skotið verður upp, at støður, har ein persónur verður noyddur til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan frameftir skulu verða fevndar av § 225, aðrar kynsligar gerðir.
  - Ósketni í samband við lokking § 228
    - Skotið verður upp, at hóast gerningsmaðurin hevur verið óskettin í mun til aldur og tilstandi hjá órættaða, so kann hetta revsast. Revsingin verður tó lutfalsliga linari.
  - Nýggj § 229 um lokking
    - Nýggj áseting verður sett inn, sum ger lokking revsiverda. Tað vil siga, at fyrireikingin til at fremja eitt kynsligt lógarbrot móti einum barni undir 18 ár verður gjørt greitt revsivert.

Galdandi lóggáva

- Kynslig avnoyðsla, har ein persónur verður hóttur til at fremja kynsligar gerðir á sær sjálvum, kann ikki revsast sambært § 225, hóast gerðin minnir nógv um neyðtøku og kynsliga misnýtslu.
  - Orsøkin til hetta er, at tað er lagt til grund, at tað skal vera kropsligt samband millum tveir persónar fyri at kunna nýta § 225 (samlegulíknandi gerðir).
  - Eftir umstøðunum kann tað ístaðin revsast fyri ólógligan tvingsil og fyri blúnisbrot.

Galdandi lóggáva

- Ongar beinleiðis ásetingar eru um lokking í kapitli 24 í revsiógini
  - Í staðin kann tað eftir umstøðunum revsast eftir øðrum ásetingum í revsilógini, eitt nú sum roynd at:
    - fremja kynsligt brotsverk
    - fremja blúnisbrot
    - taka upp, hava um hendi ella breiða út kynsligt tilfar við ein persón undir 18 ár
  - Tað kann verða trupult at prógva tilætlan, serliga tí tað ikki er greitt, hvat ítøkiliga brotsverkið er, sum ætlanin er at fremja.

Galdandi lóggáva

- § 94, stk. 4 ásetir, at fyrningarfreistin fyri ávís brotsverk í fyrsta lagi verður roknað frá tí degi, at tann órættaði fyllir 21 ár.
- Ætlanin er, at tað sama er galdandi viðvíkjandi lokking móti einum barni undir 15 ár – hetta er tað sama sum er galdandi fyri blúnisbrot.

Galdandi lóggáva

- § 228 ásetir, at brot á ávísar ásetingar í revsilógini, kunnu revsast, hóast gerningsmaðurin bert hevur verið óskettin í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða.

Endamálið við uppskotinum

- Revsilógin hevur ikki í nóg stóran mun fylt við talgildu menningini og talgilda veruleikanum.
- Tað er torført at lyfta prógvbyrðuna eftir galdandi lóggávu.
- Uppskotið dagførir kapittulin um kynslig brotsverk og ger tað meira tíðarhóskandi.
  - Tað verður møguligt í størri mun at døma fyri kynsliga avnoyðslu og fyri lokking.

Kynslig avnoyðsla

- § 225 ásetir, at §§ 216 –224 eisini eru galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.
  - Við kynsligar gerðir verður sipað til samlegulíknandi gerðir. Í hesum liggur, at tað skal vera kropsligt samband millum tveir persónar.
- Við uppskotinum verða støður, har ein persónur verður noyddur til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan, framyvir fevndar av § 225.

Kynslig avnoyðsla

- Kynslig avnoyðsla minnir um tær gerðir, sum eru revsiverdar sambært § 225, men eru ikki fevndar, tí órættaði sjálvur fremur tær.
- Ætlanin er ikki at víðka um virkisøkið fyri § 225 uppá aðrar mátar.
- Tað er ein fyritreyt fyri at nýta víðkanina, at gerningsmaðurin er hjástaddur ella tekur ímóti eini mynd, einum video ella líknandi av kynsligu gerðini.

LM-045/2023

Kynslig avnoyðsla

- Tað er ein treyt, at gerningsmaðurin hevur fingið órættaða til at fremja eina gerð fevnd av §§ 216-224
  - Tað skulu verða dømi um tvingsil, hóttanir, avnoyðslu ella aðrar umstøður, sum benda á, at tað ikki er nakað lógligt samtykki.
  - Tað er ikki avgerandi, um órættaði hevur givið samtykki, eins og tað ikki hevur týdning, hvør hevur tikið stig til tað, um talan er um:
    - Barn undir 12 ár.
    - Barn undir 15 ár.
    - Persón undir 18, sum er undir umsjón av gerningsmannium.
    - Persón undir 18 ár, sum litin er gerningsmanninum upp í hendur til undirvísingar ella uppalingar.
    - Tað skal tá førast prógv fyri, at gerningsmaðurin fekk órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan, og at gerningsmaðurin hevði tilætlan til hetta.

Lokking

- Nýggj áseting sum ger lokking revsiverda, verður sett inn sum § 229 í revsilógini.
  - Við lokking meinast støður, har ein persónur byggir upp eitt álitissamband við eitt barn ella ein unglingi, við tí endamáli at fremja kynsligt brotsverk ímóti viðkomandi ella at lokka tey at senda nakinmyndir ella myndir av kynsligum slagi.
  - Ætlanin er, at revsiramman verður sekt ella fongsul upp í 2 ár.

Lokking

- Nýggja ásetingin kriminaliserar sjálvstøðugt fyrireiking at fremja eitt brotsverk.
- Ásetingin skal raka tilburðir, har tað ikki kann førast prógv fyri roynd at gera eitt ítøkiligt kynsligt brotsverk.
- Tað er ein treyt, at tað kann førast prógv fyri kynsligari tilætlan t.v.s., at endamálið við at byggja upp sambandið er at fremja eitt kynsligt brotsverk.
- Tað er eisini ein treyt, at uppbyggingin av sambandi hendir miðvíst ella við snildum móti einum persóni undir 18 ár.

Lokking

- Skilt verður millum um órættaði er undir 15 ár ella yvir 15 ár.
- Ásetingin kann bert nýtast í førum, tá ið gerningsmaðurin er eldri enn órættaði.
- Um partarnir eru nær í aldri, royndum og menning, vil tað eftir umstøðunum kunna hava við sær, at revsiábyrgd ikki kann staðfestast.

Eitthvørt kynsligt samband er revsivert, óansæð um barnið samtykkir ella ikki.

Tað skal sostatt leggjast dentur á, um gerningsmaðurin t.d. hevur sent boð til barnið við kynsligum innihaldi ella hevur orðað eitt ynski um onkuntíð at møta barninum fysiskt ella á alnetinum ella líknandi.

Barn undir 15 ár

Tað vil vanliga seta hægri krøv til munin millum aldur hjá gerningsmanninum og órættaða og munin í royndum og menning, enn tá ið órættaði er undir 15 ár.

Tað er ikki revsivert at ganga inn í sambond, sum eru sínámillum sjálvboðin.

Hetta hevur við sær, at tað vanliga verður torført at prógva, at ein persónur, sum hevur eitt spælandi, fríggjandi ella kynsliga lætt samskifti við ein persón yvir kynsliga lógaldurin, hevur tilætlan um at fremja kynsligt brotsverk móti mótpartinum.

Tað er ikki ætlanin við uppskotinum at forða fyri lógligum sambandi.

Persónur yvir 15 ár

Lokking – hvørjir tilburðir er ætlanin at raka

- Ásetingin um lokking er ætlað at raka tilburðir**, har tað ikki kann førast prógv fyri roynd** at gera eitt ítøkiligt kynsligt brotsverk.
- Tilburðir, sum í dag kunnu revsast sum roynd at fremja neyðtøku móti einum barni undir 12 ár ella kynslig misnýtsla av einum barni undir 15 ár **skulu eisini frameftir revsast eftir somu ásetingum**.

Ósketni í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða

- Skotið verður upp, at ásetingin viðvíkjandi lokking verður fevnd av § 228, sum ásetir, at brot á ávísar ásetingar í revsilógini kann revsast, hóast gerningsmaðurin bert hevur verið óskettin í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða.
- Broytingin hevur við sær, at brot á ásetingina, sum vegna ókunnleika hjá gerningsmanninum um tilstandin ella aldurin hjá órættaða, ikki kunnu ábyrgjast gerningsmanninum sum tilætlað, kunnu revsast við lutvíst linari revsing, um gerningsmaðurin tó hevur handlað í ósketni.
- Dømi um atburð, sum eftir umstøðunum kundi verið fevndur av ásetingini, er um gerningsmaðurin ikki hevur fingið aldurin hjá órættaða, ella har órættaði ikki hevur upplýst aldurin rætt, men gerningsmaðurin vegna útsjónd og búning átti at hava vist, at órættaði var undir 18 ár.

Fyrning

- Uppskotið leggur upp til, at fyrningarfreistin fyri lokking móti einum barni undir 15 ár, í fyrsta lagi verður roknað frá tí degi órættaði fyllir 21 ár.
  - Tað sama er galdandi fyri blúnisbrot.
  - Tá revsiramman er 2 ár, fyrnast brotsverkið eftir 5 ár.

Kap. 24

§§ 218 -221 – er talan um linnandi umstøður?

- Samlega uttan samtykki = Altíð NEYÐTØKA.
  - Óansæð menningartarn, sálarheilsu ella aðrar umstøður.

§ 216

- Samlega við samtykki
- TÓ MISNÝTSLA
- Ymiskar umstøður, t.d. vegna aldur, menningartarn, sálarheilsu, útsetta støðu o.a.

§§ 218 - 224

- Víðkar § 216 og §§ 218 – 224 til eisini at fevna um samlegu líknandi gerðir

§ 225

Takk fyri

